


www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 06 - 2013

# Faroe Petroleum gott hál í Barentshavinum

Faroe Petroleum spennir seg nú aftur út á norska landgrunninum. Hesaferð í Barentshavinum. Felagið hevur fingið tillutað eitt spennandi og týðandi leitiloyvi har norðuri í Barentshavinum í 22. útbjóðingarumfarinum í Norra. Hetta hendir um somu tíð sum hitt føroyska oljufelagið, Atlantic Petroleum hevur fingið tillutað tvey leitiloyvi í Norskahavinum, longur suðuri á norska landgrunninum. Faroe Petroleum hevur verið loyvishavari á norska landgrunninum í fleiri ár og hevur havt eydnuna við sær við at gera fund í kendum oljuøkjum. Felagið hevur í dag ein munandi framleiðslu i Norra. Loyvið, PL716, sum felagið nú hevur fingið, er á Dazzler leiðini norðan fyri stóru fundini hjá Statoil, Skrugard og Havis, sum hava fingið nýggja felagsheitið Johan Castborg. Fyristøðufelag er italska Eni, 40%, Bayerngas, 20%, Petoro 20% og Faroe Petroleum 20%. Tað er longu skotið 3D seismikkur á loyvinum. Graham Stewart, stjóri sigur, at tey eru sera væl nøgd við at hava fingið hetta loyvið í einum sera spennandi øki og sum betrar støðuna hjá felagnum í Barentshavinum, har felagið longu hevur fingið tillutað týðandi loyvi. Eisini er hann sera væl nøgdur við at kunna arbeiða saman við Eni. Faroe Petroleum, sum er vorðið rættiliga virkið á norska landgrunninum, stendur til at bora fleiri brunnar í seinnu helvt av 2013, Snilehorn, Novus og Butch.